# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Solveig og Haakon Joensen 80 og 85 ár

Fríggjadagin 10. juni var opið hús í Varðagøtu í Havn, í samband við at hjúnini Solveig og Haakon Joensen fyltu 80 og 85 ár ávikavist tann 9. og 12. juni.

Solveig og Haakon eiga nógva familju og vinir, og har kom nógv fólk á gátt tann dagin.

Haakon er sumbingur, foreldrini vóru Paulina, ættað úr Nes-Vági, og Hans Petur Joensen úr Sumba.

Haakon fór sum ungur til Danmarkar á Niels Brock handilsskúlan. Síðan arbeiddi hann sum bókhaldari hjá oljufelagnum Dansk Esso í Keypmannahavn.

Solveig er ættað av Viðareiði, foreldrini vóru Sára, f. Joensen, ættað av Skælingi, og Olaf Joensen av Viðareiði. Tá Solveig var 7 ára gomul doyði mamman, og hon flutti til Klaksvíkar at búgva hjá pápabeiggjanum Alexanderi Enniberg og konuni Sofíu.

Sum ung fór Solveig til Íslands, har hon í tvey ár arbeiddi á matstovu. Eftir



tað fór hon til Keypmannahavnar. Har møttust hon og Haakon, og tey giftust í 1949.

Síðan fyrst í 50-unum hava tey búð í Havn. Haakon fekk starv sum skrivstovumaður hjá oljufelagnum Esso á Viðarnesi. Í 1954 fluttu tey í nýggj hús í Dalagøtu - undir Varða.

Miðskeiðis í 70-unum segði Haakon starvið hjá Esso upp og stovnaði sítt egna bókhaldsvirki "H.F. Joensen Bókhald", sum hevði roknskap og bókhald hjá nógvum ymiskum fyritøkum kring landið. Haakon arbeiddi til fyri umleið 5 árum síðan, tá hann legði frá sær. Dótturin Sigrun tók tá við rakstrinum av bókhaldsvirkinum.

Frítíðarítrivið hjá Haakon hevur verið trøðin í Havnardali, har hann hevur velt upp úr nýggjum og hevur seyð. Hesin áhugi stavar frá ungdómsárunum í Sumba. Meðan foreldrini livdu, var hann hvørt summar í heimbygdini, har hann hoyggjaði og fekst við seyðin.

Heimið hjá Solveig og Haakon hevur altíð verið merkt av stórum gestablídni og góðum samanhaldi í familjuni og við grannalagið. Har er hugnaligt, og duga tey bæði eisini væl at syngja og kvøða.

Haakon hevur sítt fasta pláss í Havnar kirkju, har hann kemur hvønn sunnudag.

Solveig og Haakon eiga trý børn: Sigrun, Marjun og Hans Petur. Marjun býr í Onglandi, meðan hini bæði búgva í Havn. Ommu- og abbabørnini eru 8 í tali.

### Andlát og jarðarferðir

Jógvan Joensen í Klaksvík, vanliga nevndur Jógvan hjá bedingsmeistarinum, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 21. juni, 69 ára gamal.

Gunna Mikkelsen í Vestmanna andaðist 21. juni 79 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju leygardagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Gunnu, kunnu lata Vestmanna kirkju eina gávu.

*Kelda: Útvarp Føroya*

## Minningarorð um starvsfelaga okkara

# Klæmint Olsen

**føddur 14. januar 1952 deyður 20. desember 2004**

Sólin, ljósið og tann grøni liturin bera boð um, at summarið er komið. Gleðin er stór, tí okkara pisur eru floygdar, tilreiðar at flúgva út í tann heim, sum vit á Handilsskúlanum hava fyrireikað tær til.

Tó eru stór skør í gleðini, tí Klæmint er ikki longur millum okkara. Klæmint eigur sín stóra lut í, at pisurnar nú megna at flúgva sjálvar. Klæmint lærdi tær alt um heimsspeki, føroyskt mál og mentan, hesar lærugreinar, sum hava so stóran týdning at hava við sær, um ein skal fóta sær í einum heimi í stórari broyting.

Klæmint hevði eisini ásannað, at tað hjá lærara er neyðugt at fylgja við í menningini. Hóast hann hevði holla útbúgving í føroyskum, týskum og heimsspeki, var hann farin undir at lesa Human Resource Management á Robert Gordon University.

Hann hevði stóran áhuga fyri samfelagsviðurskiftum. Politiskt ynskti hann einar sjálvstøðugar Føroyar. Har, hann var, stríddist hann fyri tí, hann helt vera rætt. Hann var heilur í øllum tí, sum hann fekst við, og tordi at tala at, tá hann helt tað vera neyðugt. Tað bera hansara arbeiði sum býráðslimur og stýrislimur hjá SEV boð um.

Klæmint hevði sítt lívsstarv á Handilsskúlanum, byrjaði sum



tímalærari í 1986 og fekk fast starv í 1989. Umframt at undirvísa, legði hann eisini stóra orku í fakfelagsarbeiði og sat nógv ár í lærararáði Handilsskúlans og upp aftur fleiri ár í yrkisfelagnum. Klæmint vildi hava skipað viðurskifti, og hann eigur ein stóran lut í, at handilsskúlalærarar hava fingið skipað lønar- og pensjónsviðurskifti.

Sum starvsfelagi var Klæmint altíð góður í ráðum. Hann hevði eina óvanliga breiða vitan um ymisk faklig øki. Hann tók eisini altíð lut í tiltøkum, næmingar ella starvsfólk skipaðu fyri. Altíð var hann tilreiðar at vera við á hugnaløtum og halda onkra skemtingarsama røðu.

Millum næmingar var Klæmint eisini sera væl lýddur. Næmingunum dámdu eisini sera væl Klæmint sum lærara. Hansara styrki var, at hann altíð lurtaði eftir og virdi teirra hugsan. Hann var sera rættvísur mótvegis næmingunum.

Klæmint var sonur Árna Olsen, yvirlækna, sum var ættaður úr Kunoy, og Elisabeth f. Clementsen ættað úr Húsavík. Teir vóru fýra brøður Jóan Eyðfinnur, Klæmint, Bjarni og Sjúrður.

Klæminti dámdi ógvuliga væl at vitja á bygd. Hann tosaði ofta um, hvussu "deiligt og avstressandi" tað var at ferðast í Húsavík, har familjan hevur summarhús. Har kundi hann taka sær av løttum saman við familjuni.

Klæmint og konan, Ragnhild Skarhamar, eiga døturnar Elisabeth, Anniku og Sunnvá. Klæmint hevði stóra umsorgan fyri familjuni og gleddist um, at tey í fjør skuldu halda jól í nýggjum húsum. Tó vildi lagnan tað øðrvísi.

Vit drýpa høvur, sakna ein góðan starvsfelaga, og tankar okkara leita til tykkara, ið eftir sita. Má Harrin styrkja tykkum í sorgini.

**Starvsfólkið á Føroya Handilsskúla í Havn**

### Dagurin

**24. juni. Jóansøka.** Føðingardagur Jóhannes Doyparans. Minningardagurin hjá halgimennum var vanliga deyðadagur teirra, men hjá Johannes Doyparanum er tað føðingardagurin, ið verður hildin, av tí at hann var heilagur longu í móðurlívi. Eftir bíbilskari frásøgn var Jóhannes Doyparin 6 mánaðir eldri enn Jesus, og tessvegna høvdu kirkjuligu myndugleikarnir gjørt av at halda føðingardagin hjá Jóhannesi áttanda dagin fyri 1. juli, og tað er júst 6 mánaðir fyri føðingardag frelsarans tann 24. desember.

Føðingardagarnir verða verða báðir hvør í sínum lagi hildnir um sólstøður.

Um øll Norðurlond verða hildnar summarveitslur um jóansøku. Jóansøkustevna, sum hon verður hildin nú á døgum, varð hildin á fyrsta sinni í 1925 á Tvøroyri.

# Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt mintust meg á mínum 80-sins tjúgindaføðingardegi, takki eg so hjartaliga.

Lukka fatti tykkum og Harrin signi tykkum.

Blíðar heilsanir
**Eliesar (Essa) Arge**